GJALDSTOVAN

# SKEIÐ

# VÁRIÐ 2023

Endamálið við virkseminum hjá Gjaldstovuni, og eisini skeiðvirkseminum, er at stuðla munadygga almenna fyrisiting. Krøvini til almennu fyrisitingina, at stýra almenna virkseminum, eru nógv. Fyri at lætta um at lúka tey, so hevur Gjaldstovan fjølbroytta skeiðsskrá.

Vit bjóða skeið á teimum økjum, har vit veita tænastur:

- **Upplýsingar at stýra við**
- **Roknskapur og bókhald**
- **Lønir og lønarupplýsingar**
- **KT**

Seinastu árini hevur Gjaldstovan havt fleiri skraddaraseymað skeið, serliga í bókhaldi og fíggjarstýring. Tá verður undirvísingarskráin gjørd í samráði við tey, sum hava biðið um skeiðið. Royndirnar hava verið ógvuliga góðar.

Skeiðini í skeiðsskránni eru býtt í hesar bólkar:

- **KT**
- **Bókhald**
- **Løn**
- **Fíggjarstýring / land**
- **Fíggjarstýring / kommunur**
- **Regluverk**
- **Office 365**

Í hesi skeiðsskránni eru fýra nýggja skeið. Tey eru ferðaavrokning (undir Bókhaldi), barsil (undir Løn) og tvey í Skjalhaldi, ávikavist Skjalhald / 360° Málsviðgerð og Skjalhald / 360° Arkivar (undir KT).

Tvey nýggj skeið komu á skrá seinasta heyst. Tey eru eru Power BI (undir Fíggjarstýring / land og Planner (undir Office 365). Hesi bæði skeiðini eru eisini á skrá nú, umframt vanligu skeiðini.

Skeiðini í Office eru skipað í samstarvi við Synergi. Tekningin til tey skeiðini fer fram á **heimasíðuni** hjá Synergi. Á heimasíðuni hjá Synergi ber at lesa nógv meira um skeiðini, og fyri ávís skeið eru eisini filmsbrot.

Skeiðini eru næstan øll telduskeið. Tey eru í frálæruhølinum hjá Gjaldstovuni, í Kvíggjartúni 1 á Argjum, sum er væl útgjørt við allari nútímans útgerð. Døgurði verður at fáa og ein drekkamunnur fyrrapart og seinnapart.

Tekning fer fram við at senda teldupost til **skeid@gjaldstovan.fo**. Er okkurt at spyrja um, setið tykkum so í samband við okkum. Ringið á Gjaldstovuna, **tel. 35 24 00**, ella skrivið til okkara á **skeid@gjaldstovan.fo**. Eisini um tað er um skraddaraseymað skeið.

***Vit bjóða tykkum vælkomnum á skeið á Gjaldstovuni.***

# KT


07 **Rættur KT atburður í tí almenna**
07 **Úrvalsbrúkaraskeið** / Landsnet
08 **Skjalhald** / 360° Málsviðgerð
08 **Skjalhald** / 360° Arkivar


# Bókhald


09 **Kontuskipan landsins**
09 **Rokningaverkgongd**
10 **Debitor**
10 **Ferðaavrokning**
11 **Høvuðsbók / FIGS**
11 **Kassauppgerð og tøkur peningur**
12 **Afturvendandi rokningar**
12 **Skraddaraseymað skeið í bókhaldi og fíggjarstýring**


# Løn


13 **Avgreiða lønir og finna lønarhagtøl**
13 **Barsil**
14 **Vaktætlan** / grundætlan
14 **Vaktætlan** / arbeiðsætlan


# Fíggjarstýring / land


15 **Hvat kostar tað almenna**
15 **Leiðslukunning** / grundskeið
16 **Leiðslukunning** / búskett
16 **Leiðslukunning** / politikkarar
17 **Power BI**
17 **Skraddaraseymað skeið í bókhaldi og fíggjarstýring**

# Fíggjarstýring / kommunur


| | |
|---|---|
| 18 | **Fíggjarstýring í kommunalu samstørvunum** |
| 18 | **Kommunala millumrokningaskipanin (**KMR**)** |
| 19 | **Leiðslukunning** / kommunur |
| 19 | **Leiðslukunning** / samstørv |


# Regluverk


| | |
|---|---|
| 20 | **Roknskaparkunngerð landsins** |
| 20 | **Roknskaparkunngerð kommunanna** |
| 21 | **At skipa innanhýsis eftirlit** |
| 21 | **Lær at gera roknskaparreglugerð** |


# Office 365


| | |
|---|---|
| 22 | **Excel** / pivot |
| 22 | **Excel** / frá grundini |
| 23 | **Excel** / víðkað |
| 23 | **Forms** |
| 24 | **Office 365** |
| 24 | **OneNote** |
| 25 | **Outlook** / frá grundini |
| 25 | **Outlook** / tær snildu funkurnar |
| 26 | **Planner** |
| 26 | **PowerPoint** |
| 27 | **SharePoint og OneDrive** |
| 27 | **Sway** / lær at gera livandi framløgur |
| 28 | **Teams** |
| 28 | **Word** |

# Mars

| | | |
|---|---|---|
| ▪ | 14. mar. | **Avgreiða lønir og finna lønarhagtøl** |
| ▪ | 16. mar. | **Planner** |
| ▪ | 20. mar. | **OneNote** |
| ▪ | 20. mar. | **Forms** |
| ▪ | 22. mar. | **Rokningaverkgongd** |
| ▪ | 22. mar. | **Power BI** |
| ▪ | 24. mar. | **Outlook** / tær snildu funkurnar |
| ▪ | 27. mar. | **Ferðaavrokning** |
| ▪ | 27. mar. | **Skjalhald** / 360° Málsviðgerð |
| ▪ | 28. mar. | **Barsil** |
| ▪ | 29. mar. | **Skjalhald** / 360° Arkivar |
| ▪ | 29. mar. | **PowerPoint** / eisini tær snildu funkurnar |
| ▪ | 30. mar. | **Leiðslukunning** / grundskeið |
| ▪ | 30. mar. | **Leiðslukunning** / búskett |

# Apríl

| | | |
|---|---|---|
| ▪ | 12. apr. | **Sway** / bergtakandi síður á netinum |
| ▪ | 17. apr. | **Teams** |
| ▪ | 20. apr. | **Excel** / frá grundini - fyrri dagur |
| ▪ | 21. apr. | **Excel** / frá grundini - seinni dagur |
| ▪ | 27. apr. | **SharePoint og OneDrive** til fílagoymslu |

# Mai

| | | |
|---|---|---|
| ▪ | 11. mai | **Vaktætlan** / grundætlan |
| ▪ | 11. mai | **Vaktætlan** / arbeiðsætlan |
| ▪ | 12. mai | **Excel** / pivot |

# Eftir avtalu ella dagur ikki ásettur

- **Afturvendandi rokningar**
- **At skipa innanhýsis eftirlit**
- **Debitor**
- **Excel** / víðkað - tveir dagar
- **Fíggjarstýring í kommunalu samstørvunum**
- **Hvat kostar tað almenna**
- **Høvuðsbók / FIGS**
- **Kassauppgerð og tøkur peningur**
- **Kommunala millumrokningaskipanin** (KMR)
- **Kontuskipan landsins**
- **Leiðslukunning /** kommunur
- **Leiðslukunning /** politikarar
- **Leiðslukunning** / samstørv
- **Lær at gera roknskaparreglugerð**
- **Office 365** - tveir dagar
- **Outlook** / frá grundini
- **Roknskaparkunngerð landsins**
- **Roknskaparkunngerð kommunanna**
- **Rættur KT atburður í tí almenna**
- **Skraddaraseymað skeið í bókhaldi**
- **Skraddaraseymað skeið í fíggjarstýring**
- **Úrvalsbrúkaraskeið /** Landsnet
- **Word**

# Rættur KT atburður í tí almenna

## Endamálið er

- at skapa felags fatan av røttum KT atburði á stovninum
- at reglurnar, sum galda fyri at handfara teldupost, verða fataðar eintýtt
- at starvsfólkini eftir skeiðið skrivliga kunnu vátta, hvat verður væntað av teimum, tá ið tey brúka teld.

## Innihald

- Greitt verður frá, hvussu dáturnar kunnu verða flokkaðar, sum stovnurin varðar av.
- Serlig viðurskifti, sum eru galdandi fyri stovnin, verða greinað. (Hetta verður fyrireikað til dagin)
- Gjaldstovan hevur, saman við øðrum stovnum, orðað brúkarakrøv. Undirvíst verður í hesum brúkarakrøvum.
- Greitt verður frá, hvat skrivliga brúkaraváttanin fatar um.

## Skeiðið er ætlað

stovnum. Skal endamálið við skeiðinum verða rokkið, so er neyðugt, at øll á stovninum luttaka.

# Úrvalsbrúkaraskeið / Landsnet

Úrvalsbrúkarin er longdi armurin hjá KT landsins. Av tí, at úrvalsbrúkarin er staðbundin, ber til hjá honum skjótt at loysa nógvu smáu og løttu uppgávurnar hjá stovninum.

## Endamálið er

at læra úrvalsbrúkaran á Landsneti tær uppgávur og tey amboð, sum eru neyðug at duga sum úrvalsbrúkari.

## Innihald

Tú lærir

- hvat Landsnet er
- hvørjar uppgávur Gjaldstovan eigur, og hvørjar úrvalsbrúkarin eigur
- hvussu KT Skivan og Helpdesk skipanin virka
- hvør munurin er millum innankervið og fakskipanir
- um rakstraravtaluna og SLA millum Gjaldstovuna og stovnarnar
- um mannagongdir, tá ið teldur skulu keypast
- um nýggjar funkur í Landsneti
- at stovna/strika brúkarar
- hvussu snarhjálp virkar.

## Skeiðið er ætlað

teimum, sum hava fingið uppgávuna at vera Landsnet úrvalsbrúkarar á stovninum.

## Forkunnleiki

Tað er neyðugt at hava grundleggjandi telduførleikar.

### Rættur KT atburður í tí almenna

| | |
|---|---|
| Nær | Eftir avtalu |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 1.000 kr. |
| Seinasta freist | Eingin |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

### Úrvalsbrúkaraskeið / Landsnet

| | |
|---|---|
| Nær | Eftir avtalu |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | Eingin |
| Seinasta freist | Eingin |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

# Skjalhald / 360° Málsviðgerð

Skeiðið er fyri stovnar á Skjalhaldi og vendir sær til øll, sum skulu arbeiða við journalskipanini 360°.

## Innihald

- Kunning um skipanina
- Handfaring av skjølum
- Skráseting av teldupostum
- Arbeiðsgongd
- Leiting.

## Skeiðið er ætlað

bæði teimum, ið eru byrjarar og teimum, ið eru meira von við at brúka skipanina, men sum vilja læra eitt sindur meira.

# Skjalhald / 360° Arkivar

Skeiðið er fyri stovnar á Skjalhaldi og vendir sær til øll, sum skulu arbeiða við journalskipanini 360° .

## Innihald

- Skráseting og rætting av málum
- Umjournalisering
- Hópdagføringar
- Víðkaðar leitingar
- Gera serstakar forsíður.

## Skeiðið er ætlað

teimum, ið arbeiða sum journalførarar.

## Forkunnleiki

Tað er ein fyrimunur, um luttakararnir hava arbeiðs-royndir við 360°

### Skjalhald / 360° Málsviðgerð

| | |
|---|---|
| Nær | 27.03.2023, kl. 9.00 - 15.00 |
| Hvar | Formula, Óðinshædd 2, 2. hædd |
| Kostnaður | 3.500 kr. |
| Seinasta freist | 22.03.2023, kl. 12.00 |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

### Skjalhald / 360° Arkivar

| | |
|---|---|
| Nær | 29.03.2023, kl. 9.00 - 15.00 |
| Hvar | Formula, Óðinshædd 2, 2. hædd |
| Kostnaður | 3.500 kr. |
| Seinasta freist | 24.03.2023, kl. 12.00 |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

# Kontuskipan landsins

## Endamálið er

- at skilja kontustrongin í Kontuskipan landsins
- at skilja millum tey tíggju høvuðssløgini, so sum rakstur, løgur og flytingar
- at duga at skráseta á rættar standardkontur.

## Innihald

Vit læra:

- um, hví felags kontuskipan verður nýtt fyri tað almenna
- um landsroknskapin sum RLÚ roknskap (rakstur, løga, útlán) og hervið um munin millum almennu kontuskipanina og ta í einum privatum virki
- alment um skrásetingarsamanhang - frá stovns-bókhaldi til fíggjarlóg
- høvuðssløgini; hvat verður bókað hvar (megin-reglur)
- um standardkontur.

## Amboð

Skeiðið tekur støði í Leiðslukunningarskipanini og Kontuskipan landsins, ið eru tøkar á heimasíðuni hjá Gjaldstovuni.

## Skeiðið er ætlað

teimum, ið røkja roknskaparligar uppgávur á almennum stovnum ella í kommunalum samstørvum. Grannskoðarar hjá almennum stovnum og tey, ið hava áhuga fyri roknskaparhaldi landsins, kunnu eisini fáa gleði av skeiðinum.

Skeiðið verður lagt til rættis eftir, hvør ið teknar seg, soleiðis at dentur verður lagdur á tað, sum er viðkomandi fyri luttakaran.

## Forkunnleiki

Tað er fyrimunur at skilja grundleggjandi bókhaldslig hugtøk.

# Rokningaverkgongd

## Endamálið er

at lýsa at lýsa, hvussu Búskaparskipan landsins (BSL) er skipað og Rokningaverkgongd (RVG), og hugt verður at, hvussu kreditorrokningar verða viðgjørdar, og hvar í Leiðslukunningarskipanini ábyrgdarpersónar kunnu fylgja kreditorrokningum.

## Innihald

Vit læra:

- um bygnaðin í Búskaparskipan landsins
- at kontera rokningar
- at stovna innanhýsis skjøl
- at stovna konteringslinjur (alias)
- at finna rokningar aftur í  Leiðslukunningar-skipanini.
- at afturhalda gjald á rokningum
- at heinta rokningar frá góðkennarum og leysgevarum
- at flyta rokningar til aðrar stovnar
- at rætta rokningar
- at broyta gjaldfreist
- at velja rætta tíðarskeið

## Skeiðið er ætlað

teimum, ið arbeiða við ognarbókhaldi og javnan avgreiða rokningar og kreditnotur.

## Forkunnleiki

Tað er fyrimunur at vita um Kontuskipan landsins, og tað er neyðugt at hava grundleggjandi vitan um teld.

### Kontuskipan landsins

| | |
|---|---|
| Nær | Eftir avtalu |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 1.000 kr. |
| Seinasta freist | Eingin |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

### Rokningaverkgongd

| | |
|---|---|
| Nær | 22.03.2023, kl. 9.00 - 12.00 |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 1.000 kr. |
| Seinasta freist | 20.03.2023, kl. 12.00 |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

# Debitor

## Endamálið er
at læra at loysa grundleggjandi uppgávur í skuldara-bókhaldinum, serliga skráseting. At læra at finna fram skrásetingar, yvirlit og skriva út listar, sum lætta um í sambandi við eftirlit, innheintan o.tíl.

## Innihald
Vit læra:

- hvussu partsskipanirnar í FSL skipanini hanga saman
- at stovna kundar
- at skráseta rokningar
- at skráseta kreditnotur
- at knýta skjøl í skrásetingina
- at rætta konteringar í skrásettum rokningum/kreditnotum
- at allýsa faktura/vørulinjur
- at skriva rokningar/kreditnotur út
- at fyrispyrja um kunda og um rokning
- at skriva saldulista út
- at stemma av millum Høvuðsbók (samlikonta) og Debitor (greinaður saldulisti)

Vit royna eisini at skráseta sjálvi.

## Skeiðið er ætlað
teimum, ið javnan skráseta krøv og vanligar rokningar. Arbeiða við skuldarabókhaldi, t.d. við at stemma av og innheinta.

## Forkunnleiki
Tað er fyrimunur at vita um bókhaldsligu grundhugtøkini, og neyðugt er at hava grundleggjandi vitan um teld.

# Ferðaavrokning

## Endamálið er
at læra at avgreiða uttanlandsferðir, frá tí at biðið verður um ferðaloyvi til øll ferðin er endaliga gjørd upp í Ferðaavrokningingarskipanini.

## Innihald
Vit læra:

- Hvussu skipanin er bygd upp
  - hvør verkgongdin í skipanini er
  - hvussu starvsfólk verða stovnað í skipanini
  - hvørjir leiklutir eru, so sum starvsfólk, góðkennari, leysgevari og skrivari
- Áðrenn farið verður avstað
  - at biðja um ferðaloyvi og forskot
  - at gera ferðaætlan, t.e. hvørji lond gongur leiðin til og nær, hvørjar dagar verður hildið frí og nær endar ferðin
  - at góðkenna og leysgeva ferðaloyvi og forskot
- Á ferðini
  - at brúka fartelefonina at viðhefta kvittanir
- Tá ið ferðin er av
  - at gera ferðina upp
  - at góðkenna og leysgeva ferðauppgerð
- Annað
  - hvørji yvirlit eru í skipanini
  - um aðrar hentleikar so sum bólkaferðir og at avgreiða ferðaseðlar.

## Skeiðið er ætlað
teimum, ið góðkenna og leysgeva ferðir hjá starvs-fólkum og teimum, ið hava leiklutin sum skrivari.

## Forkunnleiki
At vera brúkari í Ferðaavrokningarskipanini, t.e. góðkennari, leysgevari ella skrivari.

## Debitor

| | |
|---|---|
| Nær | Eftir avtalu |
| Hvar | Eftir avtalu |
| Kostnaður | 1.000 kr. |
| Seinasta freist | Eingin |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

## Ferðaavrokning

| | |
|---|---|
| Nær | 27.03.2023, kl. 13.00 - 16.00 |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 2. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 1.000 kr. |
| Seinasta freist | 24.03.2023, kl. 12.00 |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

# Høvuðsbók / FIGS

## Endamálið er
at læra at skráseta o.tíl. í Høvuðsbók. At læra at leita fram tær upplýsingar og skriva út tey útprent, sum verða brúkt til fíggjarliga at stýra stovninum.

## Innihald
Vit læra:

- um hvussu partsskipanirnar í FSL skipanini hanga saman
- at skráseta journalir (t.d. kassauppgerð)
- at knýta skjøl í journalir
- at skriva út journalir
- at dagføra (bóka) journalir
- at broyta tíðarskeið á journal
- at afturføra journal
- um ymsar viðkomandi roknskaparvegleiðingar
- at skráseta sjálvi
- at fyrispyrja um kontur
- at fyrispyrja um journalir
- at skriva út kontuúrrit, rakstrarroknskap, fíggjarstøðu og játtanarroknskap.

## Skeiðið er ætlað
teimum, ið arbeiða við bókhaldi og roknskaparligum viðurskiftum,eru áhugað í at fylgja við fíggjarligu gongdini á stovninum og røkja høvuðsbókhaldið á stovninum, m.a. bóka peningastovnskontur.

## Forkunnleiki
Kenna bókhaldsligu grundhugtøkini, hava verið á skeiði í Kontuskipan landsins ella hava samsvar-andi førleikar og grundleggjandi vitan um teld.

# Kassauppgerð og tøkur peningur

## Endamálið er
at læra formligu reglurnar fyri at umsita gjaldføri; at læra at fylla út kassauppgerðarskjalið EK 25, t.d. eisini at tryggja, at "kassin" stemmar.

## Innihald
Vit læra:

- um tær formligu reglurnar, sum eru galdandi fyri at umsita tøkan pening
- hvat er ein kassauppgerð
- hvussu kassauppgerðarskjalið EK 25 verður brúkt við ymiskum excel modellum
- hvørji skjøl skulu verða løgd við kassauppgerðarskjali
- hvussu verður "kassin" stemmaður av:
    - við uppteljing/kontuavriti
    - við bókhaldi.

## Skeiðið er ætlað
teimum, ið arbeiða við gjaldføri antin í bókhaldinum ella í kassafunkuni.

## Forkunnleiki
Tað er ein fortreyt at vita um tey grundleggjandi bókhaldsligu hugtøkini, og tað er eisini ein fyrimunur at kenna Kontuskipan landsins

### Høvuðsbók / FIGS

| | |
|---|---|
| Nær | Eftir avtalu |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 1.000 kr. |
| Seinasta freist | Eingin |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

### Kassauppgerð og tøkur peningur

| | |
|---|---|
| Nær | Eftir avtalu |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 1.000 kr. |
| Seinasta freist | Eingin |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

# Afturvendandi rokningar

Við afturvendandi rokningum ber til í kreditorskipanini at skráseta fastar mánaðarligar ella ársfjórðingsligar flytingar, har upphæddirnar eru tær somu, fyri t.d. húsaleigu, hita og rakstrarstudning.

## Endamálið er

at læra, um hvussu afturvendandi rokningar verða stovnaðar og leysgivnar.

## Innihald

- læra um skipanina
- skráseta afturvendandi rokningar
- leita fram bektir í skipanini
- viðhefta skjøl
- skriva út bektir
- leysgeva
- skráseta sjálvi.

## Skeiðið er ætlað

teimum, sum avgreiða afturvendandi, eins útgjøld til ávísan kreditor.

## Forkunnleiki og fortreyt

Tað er fyrimunur at duga at bóka í kreditor.

# Skraddaraseymað skeið í bókhaldi og fíggjarstýring

Til ber hjá stovnum at biðja um skraddaraseymað skeið. Seinastu árini hevur Gjaldstovan havt fleiri skraddaraseymað skeið, serliga í bókhaldi og fíggjarstýring. Okkurt skeiðið hevur verið fyri einum stovni. Okkurt hevur verið fyri fleiri stovnum, og tá er tað stovnar, sum eru ógvuliga líkir.

Undirvísingarskráin er gjørd í samráði við stovnarnar, sum hava biðið um skeiðið. Royndirnar við slíkum skeiðum hava verið ógvuliga góðar.

Prísurin fyri hesi skeið verður avtalaður í hvørjum einstøkum føri.

Evnini eru lýst undir **Bókhald, Fíggjarstýring og Løn** í skeiðsyvirlitinum.

## Afturvendandi rokningar

| | |
|---|---|
| Nær | Eftir avtalu |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. Hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 500 kr. |
| Seinasta freist | Eingin |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

## Skraddaraseymað skeið

| | |
|---|---|
| Nær | Eftir avtalu |
| Hvar | Eftir avtalu |
| Kostnaður | Eftir avtalu |
| Seinasta freist | Eingin |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

# Avgreiða lønir og finna lønarhagtøl

## Endamálið er

at læra at avgreiða lønir í almennu skipanini, sum eitur Lønargreiðsla, og læra at finna lønarhagtølini aftur í skipanini, sum eitur Lønarkunning.
.

## Innihald

Á skránni er m.a.

**Lønargreiðsla**

- Skráseta nýtt starv
  - Fast starv og tíðaravmarkað starv
  - Tímalønt starv
- Skráseta broytingar
  - Lønarbrot, leingja starv og enda starv, bankakontu og gera setanarbræv
- Skráseta lønir
  - Tímalønir, ferðauppgerð innanlands, fundarpening

**Lønarkunning**

- Útgjøld býtt á
  - mánaðir og ár, lønarbólkar og lønarsløg
  - lønarútgjøld, útgjaldsdagar og hvørji starvsfólk hava fingið løn
- Lønartøl og ársverk
  - Býtið millum menn og kvinnur, sáttmálar og starvsheitir, fastløn og tímalønt
- Einstaka starvsfólki
  - Lønargongd og starvsupplýsingar, innvunnin frítíð, útgjøld og skjøl, innvunnin starvsaldur.

## Skeiðið er ætlað

teimum, ið skráseta løn ella arbeiða við lønartølum. Tað er bæði fyri starvsfólk á almennum stovnum og í eldrasamstørvunum.
.

## Fortreyt

Neyðugt er at vera stovnað/ur sum brúkari í Lønargreiðsluni ella Lønarkunningini.

# Barsil

## Endamálið er

at geva grundleggjandi vitan um at arbeiða við arbeiðsætlan í Vaktætlanarskipanini.

## Innihald

Vit læra

- at leggja arbeiðsætlan
- at stýra eini arbeiðsætlan – flyta aftur og fram
- at rulla út grundætlan
- at rætta tørv
- at rætta arbeiðsætlan
- at skráseta løn
- um útrokning og lønarsløg
- at skráseta arbeiði, meirarbeiði og yvirtíð
- at skráseta fráveru, sjúku, frítíð, avspákan, skeið barsil o.a.

## Skeiðið er ætlað

teimum, sum arbeiða við at skráseta í Vaktætlanar-skipanini.

## Forkunnleiki og fortreyt

Tað er neyðugt at vera stovnað/ur sum brúkari í Vaktætlan og arbeiða við at skráseta vaktir í skipanini.. Eisini er neyðugt at hava verið á skeiðinum ‘Vaktætlan / grundætlan’ ella hava samsvarandi kunnleika.

## Avgreiða lønir og finna lønir

| | |
|---|---|
| Nær | 14.03.2023, kl. 9.00 - 12.00 |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 1.000 kr. |
| Seinasta freist | 10.03.2023, kl. 12.00 |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

## Barsil

| | |
|---|---|
| Nær | 28.03.2023, kl. 9.00 - 12.00 |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | Eftir avtalu |
| Seinasta freist | 24.03.2023, kl. 12.00 |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

# Vaktætlan / grundætlan

## Endamálið er
at geva grundleggjandi vitan um at arbeiða við grundætlan í Vaktætlanarskipanini.

## Innihald
Vit læra:

- at gera grundætlan
- at knýta persónar afturat grundætlan
- um tørvsupplýsingar í grundætlanini
- um samanseting í grundætlan grundað á virksemi
- um samanseting í grundætlan grundað á vaktir:
  - skráseta
  - avrita
  - rætta vaktir
- um ta lidnu grundætlanina.

## Skeiðið er ætlað
teimum, sum arbeiða við at skráseta í Vaktætlanar-skipanini.

## Forkunnleiki og fortreyt
Tað er neyðugt at vera stovnað/ur sum brúkari í Vaktætlan og at arbeiða við at skráseta vaktir í skipanini.

# Vaktætlan / arbeiðsætlan

## Endamálið er
at geva grundleggjandi vitan um at arbeiða við arbeiðsætlan í Vaktætlanarskipanini.

## Innihald
Vit læra

- at leggja arbeiðsætlan
- at stýra eini arbeiðsætlan – flyta aftur og fram
- at rulla út grundætlan
- at rætta tørv
- at rætta arbeiðsætlan
- at skráseta løn
- um útrokning og lønarsløg
- at skráseta arbeiði, meirarbeiði og yvirtíð
- at skráseta fráveru, sjúku, frítíð, avspákan, skeið barsil o.a.

## Skeiðið er ætlað
teimum, sum arbeiða við at skráseta í Vaktætlanar-skipanini.

## Forkunnleiki og fortreyt
Tað er neyðugt at vera stovnað/ur sum brúkari í Vaktætlan og arbeiða við at skráseta vaktir í skipanini.. Eisini er neyðugt at hava verið á skeiðinum ‘Vaktætlan / grundætlan’ ella hava samsvarandi kunnleika.

## Vaktætlan / grundætlan

| | |
|---|---|
| Nær | 11.05.2023, kl. 9.00 - 12.00 |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 1.000 kr. |
| Seinasta freist | 08.11.2023, kl. 12.00 |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

## Vaktætlan / arbeiðsætlan

| | |
|---|---|
| Nær | 11.05.2023, kl. 13.00 - 16.00 |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 1.000 kr. |
| Seinasta freist | 08.11.2023, kl. 12.00 |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

# Hvat kostar tað almenna

## Skeið fyri tíðindafólkum

Í skipanunum hjá Gjaldstovuni er ørgrynna av upplýsingum um tað almenna. Vit halda, at tað eru upplýsingar, sum hava áhuga hjá almenninginum, og bjóða tí tíðindafólki á skeið fyri at vísa, hvar hendur fæst á hesum upplýsingunum.

## Innihald

Talan er m.a. um at finna upplýsingar um

- almennar játtanir og almennar roknskapir hjá landi og kommunum og søguligu gongdina síðani seinru helvt av 90-árunum
- kommunuskatt, m.a. at í 2016 rindaði hvør borgari á Eiði 48.423 kr. og hvør klaksvíkingur 64.189 kr., í aldrinum 18 - 66 ár.
- útreiðslur til fólkaskúla, m.a. at í 2016 kostaði hvørt skúlabarn í Havn 12.216 kr. og í Eysturkommunu kostaði tað 22.165 kr.
- lønarhagtøl fyri landið, t.d. ársverk og miðallønir liðað á grein, kyn, sáttmála og aldursbýti, har tað m.a. sæst, at í 2016 forvunnu kvinnur í miðal 367.795 kr. og menn 438.209 kr.
- gjaldføri og skatt

Talan er um upplýsingar, sum liggja á heimasíðuni hjá Gjaldstovuni, og sum øll hava atgongd til.

## Skeiðið er ætlað

tíðindafólkum.

## Forkunnleiki

Eingin.

# Leiðslukunning / grundskeið

Í Leiðslukunningarskipanini er atgongd til allar týdningarmiklar upplýsingar úr skipanunum hjá Gjaldstovuni. Vit leggja stóran dent á at veita loysnir til øll stig í fyrisitingini, t.d. til makrobúskaparligar greiningar og til at stemma av serligar spurningar sum t.d. lønarkoyringar. Allar upplýsingar verða skrásettar á stovnsnummar, so tær eru meiri málrættaðar og tryggari. Í skipanini ber til at hava eftirlit við innanvirkis fíggjarætlan, t.d. liðað sundur á stað og endamál. Eisini ber til at fáa yvirlit yvir ognarar, skuldarar, kontuavrit og at fáa talgildað skjal fram á skíggjan. Alt aftur til fyrstu skrásetingarnar í BSL.

## Endamálið er

at geva grundleggjandi vitan um Leiðslukunningarskipanina og hvørjir møguleikar eru.

## Innihald

- innførsla í skipanina
- møguleikar at vísa dátur og flyta út í rokniark
- kontuavrit
- fakturar
- yvirlit yvir ognarar
- yvirlit yvir skuldarar o.s.fr.

## Skeiðið er ætlað

stovnsleiðslum, teimum, ið arbeiða við fíggjarviðurskiftum og teimum, ið tørva gott yvirlit. Skeiðið er eisini ætlað teimum, ið dagliga skráseta t.d. í verkgongdarskipanini, høvuðsbók og debitor.

## Forkunnleiki og fortreyt

Tað er fyrimunur at duga bygnaðin í almennu kontuskipanini. Harafturat skulu luttakarar vera brúkarar við atgongd til minst eitt stovnsnummar.

### Hvat kostar tað almenna

| | |
|---|---|
| Nær | Eftir avtalu |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 2. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | Eingin |
| Seinasta freist | Eingin |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

### Leiðslukunning / grundskeið

| | |
|---|---|
| Nær | 30. mars 2023, kl. 9.00 - 12.00 |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 1.000 kr. |
| Seinasta freist | 28. mars 2023, kl. 12.00 |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

# Leiðslukunning / búskett

## Endamálið er

at læra handverkið at leggja eina fíggjarætlan inn í búskettpartin av Leiðslukunningarskipanini. Arbeitt verður í trimum dimensiónum, har mánaðurin eisini verður roknaður sum ein dimensión.

## Innihald

Tosað verður í høvuðsheitum um, á hvørjum stigi tað er hóskandi at búsketta og um rullandi búskett. Undirvíst verður í virknaðinum í skipanini. Av tí at tað kann vera fløkjaligt at arbeiða í fleiri dimensiónum, verður undirvíst eftir einum føstum leisti: Fyrst at gera yvirskipaða búskettið út frá eini dimensión, síðan at liða tað út á næstu dimensiónina t.d. standardkontur. Síðst verður búskettið býtt út á mánaðir. Arbeitt verður fyrst við einum grundarbúsketti. Broytingar til grundarbúskettið verða handfarnar í skipanini (vit kunnu kalla tað búskettversiónir), og víst verður, hvussu hesir virknaðir virka.

Standardbúskettini í skipanini eru á standardroknskaparkontu, stað, endamál, verkætlan og verkevni.

## Skeiðið er ætlað

fram um alt stovnum, sum arbeiða við búskettum. Tínæst er skeiðið ætlað roknskaparstarvsfólkum, sum hava ábyrgdina av at viðlíkahalda búskett.

## Forkunnleiki og fortreyt

Neyðugt er at duga at brúka Leiðslukunningarskipanina og hava rættindi at umsita búskett í Leiðslukunningarskipanini.

# Leiðslukunning / politikkarar

## Endamálið er

at geva umboðum fyri politisku skipanina eitt amboð, hvørs funkur kunnu verða brúktar m.a. í fíggjarlógararbeiðinum.

## Innihald

Talan er m.a. um at finna upplýsingar um

- lutfalsligan samanhang yvir ár
- játtanarupplýsingar
- meirnýtslu
- framskriva játtanir - fara játtanir at halda
- skattahagtøl
- gjaldføri landskassans
- ársverk liðað á kyn, sáttmála og aldursbýti
- miðalløn liðað á kyn, sáttmála og aldursbýti
- fólkatal liðað á børn, vaksin og gomul
- samanberingar kommunur

Talan er um upplýsingar, sum liggja á heimasíðuni hjá Gjaldstovuni og sum øll hava atgongd til.

## Skeiðið er ætlað

umboðum fyri politisku skipanina.

## Forkunnleiki

Eingin.

### Leiðslukunning / búskett

| | |
|---|---|
| Nær | 30. mars 2023, kl. 12.40 - 14.40 |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 500 kr. |
| Seinasta freist | 28. mars 2023, kl. 12.00 |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

### Leiðslukunning / politikkarar

| | |
|---|---|
| Nær | Eftir avtalu |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 2. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | Eingin |
| Seinasta freist | Eingin |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

# Power BI

## Endamálið er
at læra at brúka rapportirnar, ið frammanundan eru gjørdar í Power BI við dátum úr Leiðslukunning.

## Innihald
Tú lærir

- at brúka rapportirnar
- um hentleikar í Power BI eisini borið saman við verandi hentleikar í LKS
- at heinta dátur úr Leiðslukunning í Power BI
- um mannagongdir í Power BI og Power BI rapportirnar
- um hentleikar í Power BI.

## Fortreyt
Neyðugt er at hava atgongd til Power BI.

## Legg til merkis!
Rapportirnar kunnu í løtuni bara deilast við brúkarar á stovnum, ið eru í Landsneti. Koma fólk á skeið frá stovnum, sum ikki eru í Landsneti, so kunnu tey ikki fáa atgongd til sínar dátur – ella leinkini til rapportirnar í Power BI - men tey kunnu tó fylgja við í undirvísingini.

# Skraddaraseymað skeið í bókhaldi og fíggjarstýring

Til ber hjá stovnum at biðja um skraddaraseymað skeið. Seinasta árið hevur Gjaldstovan havt fleiri skraddaraseymað skeið, serliga í bókhaldi og fíggjarstýring. Okkurt skeiðið hevur verið fyri einum stovni. Okkurt hevur verið fyri fleiri stovnum, og tá er tað stovnar, sum eru ógvuliga líkir.

Undirvísingarskráin er gjørd í samráði við stovnarnar, sum hava biðið um skeiðið. Royndirnar við slíkum skeiðum hava verið ógvuliga góðar.

Prísurin fyri hesi skeið verður avtalaður í hvørjum einstøkum føri.

Evnini eru lýst undir **Bókhald** og **Fíggjarstýring** í skeiðsyvirlitinum.

## Power BI

| | |
|---|---|
| Nær | 22.03.2023, kl. 13.00 - 16.00 |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 1.000 kr. |
| Seinasta freist | 20.03.2023, kl. 12.00 |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

## Skraddaraseymað skeið

| | |
|---|---|
| Nær | Eftir avtalu |
| Hvar | Eftir avtalu |
| Kostnaður | Eftir avtalu |
| Seinasta freist | Eingin |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

# Fíggjarstýring í kommunalu samstørvunum

## Endamálið er
at skapa yvirlit yvir týðandi tættir í fíggjarstýringini hjá kommunalum samstørvum.

## Innihald
Á skeiðnum verður dentur lagdur á
- skipað yvirlit – m.a. samstarv  og kommunur
- ætlanartøl og møguliga búskett og framskrivingar
- hvar finnast ymsu inntøkurnar og hvør rindar hvat?
- hvussu skal millumrokningin við Gjaldstovuna og samstørvini skiljast
- transaktiónssløg, sum løn, kreditorar, clearing, avrokning og Landsnet
- hvussu finna vit lønir og lønarstaklutir aftur
- hvussu bóka vit lønir, og hvat skal samstarvið síggja til
- hvar gongur ábyrgdarbýtið millum samstarvið og Gjaldstovuna, í tænastuavtaluni (SLA)
- hvat skal samstarvið mánaðarliga stemma av t.d. inntøkur, kreditorar og lønir.

## Skeiðið er ætlað
Leiðslu og roknskaparfólkum í samstørvunum.

## Forkunnleiki
Skilagott er at seta seg inn í tænastuavtaluna (SLA) millum Gjaldstovuna og samstarvið.

## Fortreyt
At luttakararnir hava atgongd til Leiðslukunning, lønardátur í Leiðslukunning ella Kommunalu millumrokningina.

# Kommunala millumrokn-ingarskipanin (KMR)

Allar flytingar millum kommunur, kommunu og samstarv ella millum samstørv skulu fara umvegis kommunalu millumrokningarskipanina (KMR). Flytingin kann verða skrásett sum útgjald. Tann parturin, sum skal rinda, skrásetur tað. Flytingin kann eisini verða skrásett sum krav. Tá skrásetur tann parturin, sum skal hava peningin, og so leysgevur tann parturin, sum skal rinda.

## Endamálið er
at læra at avgreiða útgjøld og krøv í kommunalu millumrokningarskipanini.

## Innihald
- kunning í skipanina
- skráseta útgjald
- broyta útgjald
- skráseta krav
- broyta krav
- avvísa krav
- yvirlit yvir komandi inngjøld
- kontuavrit.

## Skeiðið er ætlað
starvsfólkum í kommunum og kommunalum sam-størvum, sum skráseta og leysgeva gjøld og krøv í kommunalu millumrokningarskipanini.

## Forkunnleiki og fortreyt
Neyðugt er at vera stovnaður sum brúkari í kommunalu millumrokningarskipanini.

### Fíggjarstýring í samstørvunum

| | |
|---|---|
| Nær | Eftir avtalu |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 2. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | Eingin |
| Seinasta freist | Eingin |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

### Kommunal millumrokning

| | |
|---|---|
| Nær | Eftir avtalu |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | Eingin |
| Seinasta freist | Eingin |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

# Leiðslukunning / kommunur

Gjaldstovan hevur ment hentleikar, so at kommunurnar her og nú kunnu síggja upplýsingar, m.a. samanberingar millum kommunur, og síggja hvønn veg, útreiðsluvøksturin fer.

## Innihald

Talan er m.a. um at finna upplýsingar um

- kommunuskatt pr. borgara 18 - 66 ár
- kommunuskatt pr. borgara 18 - 66 ár, reinsað fyri kommunuskattaprosent
- útreiðslur til fólkaskúla pr. barn
- útreiðslur til barnaansing pr. barn
- útreiðslur til fyrisiting pr. borgara
- útreiðslur til mentan pr. borgara
- fólkatal
- samanberingar kommunur

Talan er um upplýsingar, sum liggja á heimasíðuni hjá Gjaldstovuni, og sum øll hava atgongd til.

## Skeiðið er ætlað

umboðum fyri kommunurnar og roknskaparfólkum hjá kommununum.

## Forkunnleiki

Eingin.

# Leiðslukunning / samstørv

Í Leiðslukunningarskipanini er atgongd til allar týdningarmiklar upplýsingar úr skipanunum hjá Gjald-stovuni. Vit leggja stóran dent á at veita loysnir til øll stig í fyrisitingini, t.d. til makrobúskaparligar greiningar og til at stemma av serligar spurningar sum t.d. lønarkoyringar. Allar upplýsingar verða skrásettar á stovnsnummar, so tær eru málrættaðar og tryggar. Í skipanini ber til at hava eftirlit við innanvirkis fíggjarætlan, t.d. liðað sundur á stað og endamál. Eisini ber til at fáa yvirlit yvir ognarar, skuldarar, kontu-avrit og at fáa talgildað skjal fram á skíggjan. Alt aftur til fyrstu skrásetingarnar í BSL.

## Endamálið er

at geva grundleggjandi vitan um Leiðslukunningarskipanina og hvørjir møguleikar eru.

## Innihald

- innførsla í skipanina
- møguleikar at vísa dátur og flyta út í rokniark
- kontuavrit
- fakturar
- yvirlit yvir ognarar
- yvirlit yvir skuldarar o.s.fr.
- loysa uppgávur.

## Skeiðið er ætlað

Serliga teimum samstørvum, ið avgreiða síni roknskaparligu viðurskifti í Búskaparskipan landsins. Skeiðið er ætlað leiðslum, teimum, ið arbeiða við fíggjarviðurskiftum og teimum, ið tørva gott yvirlit. Skeiðið er eisini ætlað teimum, ið dagliga skráseta í FSL skipanini, t.d. verkgongdarskipanini, høvuðsbók og debitor.

## Forkunnleiki og fortreyt

Tað er fyrimunur at duga bygnaðin í almennu kontuskipanini. Harafturat skulu luttakarar vera brúkarar við atgongd til minst eitt stovnsnummar.

### Leiðslukunning / kommunur

| | |
|---|---|
| Nær | Eftir avtalu |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 1.000 kr. |
| Seinasta freist | Eingin |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

### Leiðslukunning / samstørv

| | |
|---|---|
| Nær | Eftir avtalu |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 1.000 kr. |
| Seinasta freist | Eingin |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

# Roknskaparkunngerð landsins

## Endamálið er
at geva yvirlit yvir kunngerðina og vísa á, hvat er týdningarmest fyri stovnarnar.

## Innihald
Greitt verður m.a. frá
- leiklutabýtinum í almenna roknskaparverkinum
- hvat verður skrásett
- um innanvirkis roknskap
- nær ein útreiðsla verður tikin við í raksturin og í hvørjum ári
- um roknskap
- viðskiftisslóð og eftirlitsslóð
- krøv til skjalfestingar
- krøv til gjaldingar hjá tí almenna

## Skeiðið er ætlað
fram um alt teimum, sum starvast hjá landinum, og sum ikki kenna kunngerðina.

### Roknskaparkunngerð landsins

| | |
|---|---|
| Nær | Eftir avtalu |
| Hvar | á Gjaldstovuni, Krónan, 2. hædd |
| Kostnaður | 1.000 kr. |
| Seinasta freist | Eingin |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

# Roknskaparkunngerð kommunanna

## Endamálið er
at geva yvirlit yvir kunngerðina og vísa á, hvat er týdningarmest fyri kommunurnar.

## Innihald
Greitt verður m.a. frá
- leiklutabýtinum í kommunala roknskaparverkinum
- hvat verður skrásett
- um innanvirkis roknskap
- nær ein útreiðsla verður tikin við í raksturin og í hvørjum ári
- um roknskap
- viðskiftisslóð og eftirlitsslóð
- krøv til skjøl

## Skeiðið er ætlað
fram um alt teimum, sum starvast í kommunum, og sum ikki kenna kunngerðina.

### Roknskaparkunngerð komm.

| | |
|---|---|
| Nær | Eftir avtalu |
| Hvar | á Gjaldstovuni, Krónan, 2. hædd |
| Kostnaður | 1.000 |
| Seinasta freist | Eingin |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

# At skipa innanhýsis eftirlit

## Endamálið er

at eftir skeiðið, so hevur skeiðsfólkið amboð at brúka at enda mánaðarroknskapin á nøktandi hátt. Ella sagt á ein annan hátt, at tey, sum arbeiða við mánaðarroknskapinum, kunnu siga, at vit hava gjørt arbeiðið fullgott. Vit hugsa eisini, at tey, sum arbeiða við roknskapi, kunnu skapa samstarv við aðrar stovnar og fólk á Gjaldstovuni.

## Innihald

Greitt verður m.a. frá

- formliga regluverkinum og ásetingum  hesum viðvíkjandi
- hvar liggja serligar avbjóðingar og frá spurningum við ársenda
- hvørjar afturvendandi spurningar setir grannskoðanin
- hvar heldur Gjaldstovan serligar avbjóðingar vera í samstarvinum millum Gjaldstovuna og stovnar
- hvørji skjalprógv (kekklistar) skulu liggja í sambandi við mánaðarenda og ársenda
- hvussu verða skipanirnar hjá Gjaldstovuni brúktar at stuðla uppundir mánaðarenda
- hevur stovnur serskipanir, hvussu verður ein rættur roknskapur tryggjaður
- høvi verður at viðgera spurningar og vit vilja gjarna hoyra um góðar partsloysnir, sum aðrir stovnar hava

## Skeiðið er ætlað

fram um alt teimum, sum hava ábyrgdina av roknskapinum á smáum og miðalstórum stovnum.

## Fortreyt

Roknskaparøkið skal formliga verða tillutað teimum, sum koma á skeiðið og at tey skulu hava formliga heimild at seta mannagongdir í verk.

# Lær at gera roknskaparreglugerð

## Endamálið er

at fáa fatan av

- at greina tað, sum er týdningarmikið
- at gera mannagongdir og greitt ábyrgdarbýti
- at taka brúkaran við í tilgongdina og at samskifta greitt

## Innihald

Fyrst verður skapt yvirlit yvir roknskaparrundskrivið. Síðan verður arbeitt í bólkum við einum dømi, um ein ikki so óvanligan stovn, sum skal hava eina rokn-skaparreglugerð. Framløga verður so í plenum um roknskaparreglugerðina.

## Skeiðið er ætlað

starvsfólki og leiðarum, sum arbeiða við roknskapar-reglugerðum.

Skeiðið er skraddaraseymað.

Tað verða bara hildin tvey skeið.

Í mesta lagi 12 fólk vera á hvørjum skeiði.

### At skipa innanhýsis eftirlit

| | |
|---|---|
| Nær | Eftir avtalu |
| Hvar | á Gjaldstovuni, Krónan, 2. hædd |
| Kostnaður | 1.000 kr. |
| Seinasta freist | Eingin |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

### Lær at gera roknskaparreglug.

| | |
|---|---|
| Nær | Eftir avtalu |
| Hvar | á Gjaldstovuni, Krónan, 2. hædd |
| Kostnaður | 1.000 |
| Seinasta freist | Eingin |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

# Excel pivot

## Endamálið er
at læra, hvussu tú kanst brúka pivottabellir til at geva tær yvirlit yvir tabellir og dátumongdir.

## Innihald
Tú lærir

- um dátugrundarlag og at skipa dáturnar, so til ber at nýta tær í pivottabellum
- at gera pivottabellir
- at fomatera pivottabel
- at sortera í pivottabel
- at seta talvur inn og broyta tær
- at seta %-teig inn
- at endurnýta pivottabellir í nýggjum ørkum
- at skipa dátur í filtur, teigar, virði og rekkjur
- um ymsar stillingar og hvussu tøl verða víst
- at broyta og dagføra dátugrundarlagið
- at seta Dashboard inn og kopiera talvur
- at stilla talvur í støðd og stað
- at brúka “Udsnit” av dátumongdini og samantvinna við grafarnar og kopiera talvur.

Les meira um skeiðið á heimasíðuni hjá Synergi.

## Skeiðið er ætlað
teimum, sum arbeiða við stórum tabellum og mongdum av dátum og vilja læra at brúkt pivottabellir, fyri lætt og skjótt at greina og skipa tær.

## Forkunnleiki
Tað er neyðugt at hava grundleggjandi førleikar í Excel.

# Excel frá grundini

## Endamálið er
at læra Excel frá grundini og læra tær mest týðandi og mest brúktu funkurnar í Excel.

## Innihald
Tú lærir

- hvussu Excel er bygt upp
- einfaldar formlar og reglur fyri hesar
- at rætta í formlum og sellum og hvussu eyka tekstur og tøl verða sett inn
- at stovna fleiri rokniørk og geva ørkunum nøvn, so lættari er at halda skil á teimum
- at flyta og margfalda rokniark, súlur, kolonnur o.a.
- at brúka ‘autoudfyld’
- at brúka formatpensilin
- at seta búmerki, síðutøl og annað inn
- um absoluttar og relativar sellur
- at brúka tøl og úrslit frá eini sellu í eini aðrari
- at sortera og síla
- um diagramm og myndir.

Les meira um skeiðið á heimasíðuni hjá Synergi.

## Skeiðið er ætlað
teimum, sum vilja læra tær grundleggjandi, týðandi og mest brúktu funkurnar í Excel, og sum hava ongar ella bara lítlar royndir við Excel frammanundan.

## Forkunnleiki
Tað er neyðugt at hava grundleggjandi telduførleikar.

## Longd
Skeiðið er í tveir dagar.

## Excel / pivot

| | |
|---|---|
| Nær | 12.05.2023, kl. 9.00 - 12.00 |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 1.440 kr. |
| Seinasta freist | 08.05.2023, kl. 12.00 |
| Tekning | Á heimasíðuni hjá Synergi |

## Excel / frá grundini

| | |
|---|---|
| Nær | 20. & 21.04.2023, kl. 9.00 - 15.00 |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 3.680 kr. |
| Seinasta freist | 14.04.2023, kl. 12.00 |
| Tekning | Á heimasíðuni hjá Synergi |

# Excel víðkað

## Endamálið er
at læra at brúka tær meiri framkomnu funkurnar í Excel. Funkur, sum í roynd og veru ikki eru so torførar at læra.

## Innihald
Tú lærir

- um navn á sellum, formateringar
- um funktiónir (fx)
- um finansiellar funkur
- um tær snildu pivottabellirnar
- um scenarie og simuleringar, hvat-nú-um..
- um professionel diagramm
- um at nýta makro'ir
- um listar og databasur
- um konsolidering
- at stovna og brúka skabelónir í tínum arbeiði
- at leggja leinkjur úr Excel í Word
- at seta t.d. diagramm úr Excel yvir í PowerPoint.

## Skeiðið er ætlað
teimum, sum hava nýtt Excel í longri tíð, men ikki eru komin ordiliga í holt við at nýta tær meir framkomnu funkurnar. Funkur sum eru sera hentar at duga, um tú javnan ella kanska dagliga arbeiðir við Excel. At duga tær snildu funkurnar kunnu spara virðismikla tíð.

## Forkunnleiki
Tað er neyðugt at duga tær grundleggjandi funkurnar í Excel og hava brúkt Excel í longri tíð.

## Longd
Skeiðið er í tveir dagar.

# Forms

## Endamálið er
at læra, hvussu Forms kann brúkast til at savna upplýsingar, sum tú á einfalt kanst arbeiða við og deila.

T.d. kanst tú, tá ið upplýsingarnar eru komnar inn, gera einfaldar og víðkaðar greiningar av úrslitunum við at nýta hagtalsyvirlitið í Forms ella Excel.

Hevur tú onkuntíð tørv á at savna upplýsingar frá øðrum? Eitt nú í samband við

- onkra kanning
- eina uppgávu
- tekning til starvsfólkadag, veitslu og aðra samkomu.

## Innihald
Tú lærir

- at stovna og deila ymisk útfyllingar- og spurnabløð
- at gera ymisk sløg av spurningum, so tú fært júst ta vitanina, sum tær tørvar
- at tillaga spurnabløðini, so svarini, tú fært, verða greinað eftir teimum svarunum, sum koma inn
- hvussu tú kanst greina svar, sum koma inn Forms ella Excel.

Les meira um skeiðið á heimasíðuni hjá Synergi.

## Skeiðið er ætlað
teimum, sum kundu hugsað sær at læra at brúka Forms.

## Forkunnleiki
Tað er neyðugt at hava grundleggjandi telduførleikar.

## Excel / víðkað

| | |
|---|---|
| Nær | Eftir avtalu |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | Eftir avtalu |
| Seinasta freist | Eingin |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

## Forms

| | |
|---|---|
| Nær | 20.03.2023, kl. 13.00 - 16.00 |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 1.700 kr. |
| Seinasta freist | 16.03.2023, kl. 12.00 |
| Tekning | Á heimasíðuni hjá Synergi |

# Office 365

Hava tit Office 365 hald, so hava tit atgongd til nógv meiri enn bara Word, Excel, Outlook og PowerPoint. Eitt nú hava tit atgongd til Teams, Planner, Sway, Forms og OneDrive. Forrit, sum kunnu lætta nógv um í arbeiðsdegnum.

## Endamálið er

at tey, ið hava Office 365, men ikki gagnnýta tað, kunnu fara undir at nýta møguleikarnar.

## Innihald

- Office 365
  - Hvørji forrit eru í Office 365?
- OneDrive for Business
  - har tú kann stovna og goyma fílur
- Teams
  - Samtalur, samskriva, deila
- OneNote
  - Minnislistar, whiteboard
- Planner
  - Ætlanir, uppgávur, diagramm
- Office 365 á snildfon og teldli
  - Leggja appir niður á snildfon og teldil
- Rótfest
  - Hvussu rótfesta vit Office 365.

## Skeiðið er ætlað

teimum, sum slett ikki duga at brúka møguleikarnar og tær, sum dugir eitt sindur og vil hava betri yvirlit.

## Forkunnleiki

Tað er neyðugt at hava grundleggjandi telduførleikar.

# OneNote

## Endamálið er

at læra, hvussu OneNote kann verða brúkt til at halda skil á hugskotum, viðmerkingum og øðrum líknandi tilfari.

Hevur tú nógv um oyruni, eru borðið og teldan hjá tær fylt við gulum seðlum, og vaknar tú um náttina, tí tú kemur í tankar um okkurt, tú hevur gloymt at skriva niður?

So er OneNote eitt sera gott amboð til tín at hjálpa tær at skipa og halda skil á hesum við tíni talgildu lummabók.

## Innihald

Tú lærir

- at skipa OneNote júst soleiðis, sum tær tørvar
- at nýta OneNote sum títt dagliga amboð, har tú skrivar hugskot og annað niður at minnast, bæði á telduni og snildfonini
- at goyma teldubrøv saman við viðkomandi tilfari, t.d. í sambandi við verkætlanir og ráðlegging
- at goyma tilfar á netinum í OneNote
- at deila tilfar, so fleiri kunnu arbeiða saman.

Les meira um skeiðið á heimasíðuni hjá Synergi.

## Skeiðið er ætlað

teimum, sum sjáldan og ongantíð hava brúkt OneNote áður.

## Forkunnleiki

Tað er neyðugt at hava grundleggjandi telduførleikar.

### Office 365

| | |
|---|---|
| Nær | Eftir avtalu |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | Eftir avtalu |
| Seinasta freist | Eingin |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

### OneNote

| | |
|---|---|
| Nær | 20.03.2023, kl. 9.00 - 12.00 |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 1.700 kr. |
| Seinasta freist | 16.03.2023, kl. 12.00 |
| Tekning | Á heimasíðuni hjá Synergi |

# Outlook / frá grundini

## Endamálið er
eftir einum degi at læra at brúka Outlook, júst sum tú brúkti tína gomlu teldupostskipan. Harumframt lærir tú fleiri snildar funkur, sum lætta um í gerandisdegnum - og gera hann stuttligari.

## Innihald
Tú lærir

- hentleikarnar
- at senda teldubrøv og taka ímóti teldubrøvum
- at gera fleiri undirskriftir, alt eftir hvønn tú skrivar til - á føroyskum, donskum og enskum - og lættliga at skifta ímillum
- at stovna uppgávur
- at stovna fundir/avtalur í kalendaranum
- at sortera
- at leita í innihaldi
- at stovna leitimappur
- at brúka nýggju funkuna 'Hurtige dele'
- at goyma tekst, ið tú kann brúka aftur, so tú sleppur undan at skriva somu boð 100 ferðir.

Les meira um skeiðið á heimasíðuni hjá Synergi.

## Skeiðið er ætlað
teimum, sum sjáldan ella ongantíð hava brúkt Outlook áður.

Lær Outlook beinanvegin og slepp undan (teimum flestu) frustratiónunum.

## Forkunnleiki
Tað er neyðugt at hava grundleggjandi telduførleikar.

# Outlook / tær snildu funkurnar

## Endamálið er
at læra allar tær nýggju og snildu funkurnar í Outlook 2016. Funkur, sum eisini royndir brúkarar ikki vita um. Aftaná skeiðið dugir tú betur at brúka Outlook at hjálpa tær at halda skil á teldupostum og uppgávum, so einki dettur burturímillum.

## Innihald
Tú lærir

- at fáa skil á og yvirlit yvir teldubrøv, sum tú ikki hevur svarað
- at gera fleiri undirskriftir, alt eftir hvønn tú skrivar til - á føroyskum, donskum, enskum - og lættliga at skifta ímillum
- um fløgg og bólkar - ein sera snildur møguleiki at halda skil á øllum teldupostum og uppgávum, so eingin dettur burturímillum. Lær, hvussu tú kanst brúka hesar funkur úrslitagott
- at stovna kontaktpersónar og bólkar
- um nýggju funkuna "Hurtige dele"
- at goyma tekst, ið tú kann brúka aftur, so tú sleppur undan at skriva somu boð 100 ferðir
- at 'automatisera' teldubrøv við funkuni "regler"
- at brúka leitifunkuna snildari.

Les meira um skeiðið á heimasíðuni hjá Synergi.

## Skeiðið er ætlað
teimum, sum vilja læra allar tær nýggju og snildu funkurnar í Outlook.

## Forkunnleiki
Tað er neyðugt at hava grundleggjandi telduførleikar.

## Outlook / frá grundini

| | |
|---|---|
| Nær | Eftir avtalu |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | Eftir avtalu |
| Seinasta freist | Eingin |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

## Outlook / tær snildu funkurnar

| | |
|---|---|
| Nær | 24.03.2023, kl. 9.00 - 12.00 |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 1.700 kr. |
| Seinasta freist | 20.03.2023, kl. 12.00 |
| Tekning | Á heimasíðuni hjá Synergi |

# Planner

## Endamálið er
at læra at brúka Planner til at halda skil á uppgávum. Planner er ein einføld onlineskipan, sum riggar væl bæði til teldu, teldil og telefon, og arbeiðir saman við m.a. Outlook, Teams. Planner er partur av Office 365 for Business haldinum.

## Innihald
Tú lærir

- at stovna eina ætlan (plan)
- at skilja millum eina almenna og privata ætlan (plan)
- at skipa eitt samstarv við fleiri fólkum
- at tilluta uppgávur
- at finna hagtøl
- at brúka Planner saman við Teams o.ø.
- at filtrera uppgávur, so tú skjótt sær
    - hvørjar uppgávur tú hevur
    - hvørjar uppgávur onnur hava
    - um onkur hevur fingið ov nógvar uppgávur
    - hvørjar uppgávur hava størstan skund
- at seta deadlines
- at deila fílur
- at kjatta
- at brúka grafisk yvirlit.

Les nógv meira um skeiðið á heimasíðuni hjá Synergi.

## Skeiðið er ætlað
teimum, sum hava nógvar bóltar í luftini í senn, arbeiða í toymum, arbeiða við verkætlanum og vilja hava betri yvirlit yvir uppgávurnar.

## Forkunnleiki
Tað er neyðugt at hava grundleggjandi telduførleikar.

# PowerPoint

## Endamálið er
at læra allar tær nýggju og smørtu funkurnar í PowerPoint. Aftaná skeiðið fert tú at hava eitt innlit í PowerPoint, sum ger teg tryggari og lættir um hjá tær, næstu ferð tú skal gera eina framløgu.

## Innihald
Tú lærir

- at seta myndir inn og snikka tær til
- at brúka ta smørtu funkuna SmartArt
- grundreglurnar um diasmaster
- um búmerkið, so tað sæst á øllum "síðum"
- at skifta millum "síðurnar" og fær tað at síggja gott út
- um framløgu, sum koyrir sjálvvirkandi, t.d. á einum kunningarskíggja
- at fjala síðu, sum ikki skal vísast á einum ávísum fundi
- at skriva eina framløgu út og um møguleikarnar, sum eru

**og nýggjar funkur sum** ..

- at seta 3d mynd og online filmar inn
- at strika bakgrund á einari mynd
- hvussu tú kanst teksta tína framløgu
- Transition Morph
- Zoom.

Les meira um skeiðið á heimasíðuni hjá Synergi.

## Skeiðið er ætlað
teimum, sum vilja læra PowerPoint. Undirvíst verður í teimum vanligastu funkunum, so tað ber til at gera eitt gott PowerPoint.

## Forkunnleiki
Tað er neyðugt at hava grundleggjandi telduførleikar.

## Planner

| | |
|---|---|
| Nær | 16.03.2023, kl. 9.00 - 12.00 |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 1.700 kr. |
| Seinasta freist | 14.03.2023, kl. 12.00 |
| Tekning | Á heimasíðuni hjá Synergi |

## PowerPoint

| | |
|---|---|
| Nær | 29.03.2023, kl. 9.00 - 12.00 |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 1.700 kr. |
| Seinasta freist | 24.03.2023, kl. 12.00 |
| Tekning | Á heimasíðuni hjá Synergi |

# SharePoint og OneDrive

## Endamálið er

at læra grundleggjandi funkurnar í SharePoint og OneDrive. Hvør er munurin á SharePoint og OneDrive? Nær skal eg goyma í OneDrive og nær er betri at brúka SharePoint?

Tað er ikki so løgið, at nógv ivast í hvat er hvat. Bæði eru partur av Office 365 og bæði goyma dáturnar í skýnum. Men tey eru ikki ymisk.

SharePoint er ein sera góður pallur til at savna ymisk sløg av tilfari, sum verður nýtt m.a. í verkætlanum og øðrum innanhýsis samstarvi. Tú kanst lættliga gera ymiskar síður, sum vísa júst tað, sum brúk er fyri.

Við OneDrive kanst tú goyma alt títt persónliga tilfar, sum bara tú skalt hava atgongd til - trygt í skýnum. Tú hevur altíð atgongd til tilfarið, og alt verður goymt sjálvvirkandi. Við at deila fílur, kanst tú samskriva við onnur í øllum Office skjølum, og tú sleppur undan endaleysum viðfestum fílum í @.

## Innihald

Tú lærir í SharePoint m.a.

- at navigera, so tú veitst, hvat liggur hvar
- um listar og savnið av tilfari, har tú kanst goyma alskyns fílur
- at gera tillagaðar síður sum lættliga vísa innihald av listum, tilfari (t.d. úr Teams), kalendarum o.ø.
- at samskriva skjøl, um versionering, t.e. skiftið millum ymsar útgávur av skjølum

og í OneDrive m.a.

- hvør munurin er á OneDrive og t.d. Dropbox
- hvussu trygdin er í OneDrive.

Les meira um skeiðið á heimasíðuni hjá Synergi.

## Forkunnleiki

Tað er neyðugt at hava grundleggjandi telduførleikar.

# Sway

## Endamálið er

at tú skjótt og lætt kanst vísa tín boðskap og tíni hugskot frá eini og hvørjari eind, so sum teldu, telefon ella teldli. Við Sway fært tú gjørt eina flotta og samvirkna framløgu, sum er løtt at deila og leggja á ymsar pallar.

Sway egnar seg harafturat væl sum amboð til tíðindabrøv og marknaðarføring av ymiskum slagi.

## Innihald

Tú lærir

- hvussu Sway er skipað
- at seta tekst, myndir, sjónbond og ljóð saman lættliga
- ymiskar hættir at sniðgeva eitt Sway
- at deila eitt Sway við telduposti, á sosialum miðlum og heimasíðum.

Les meira um skeiðið á heimasíðuni hjá Synergi.

## Skeiðið er ætlað

teimum, sum kundu hugsað sær at lært at brúkt Sway.

## Forkunnleiki

Tað er neyðugt at hava grundleggjandi telduførleikar.

## SharePoint og OneDrive

| | |
|---|---|
| Nær | 27.04.2023, kl. 9.00 - 14.00 |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 2.240 kr. |
| Seinasta freist | 24.03.2023, kl. 12.00 |
| Tekning | Á heimasíðuni hjá Synergi |

## Sway

| | |
|---|---|
| Nær | 12.04.2023, kl. 9.00 - 12.00 |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 1.700 kr. |
| Seinasta freist | 10.04.2023, kl. 12.00 |
| Tekning | Á heimasíðuni hjá Synergi |

# Teams

Avgerð ein stovnur at brúka Teams, er tað ógvuliga týðandi, at øll á stovninum, deildini ella í toyminum vita, hvussu samskiftið tykkara skal skipast frameftir. Skeiðini verða boðin út fyri **einstaklingar**, **bólkar** og sum **netsetur**.

## Endamálið er
at læra hvat Teams er og hvørjir fyrimunir eru.

## Innihald
Tú lærir

- um Teams:
    - at stovna og strika eitt toymi
    - loyvir
    - stillingar
    - favorittar
- um kanalir og spjøldur:
    - stovna og strika kanalir
    - nýggj spjøldur og knýta appir til spjøldur
- um fílur og mappur:
    - umsita fílur
    - broyta í fílum í Teams
    - arbeiða samstundis í einari fílu
    - synkronisera fílur
- um samrøður
- um fundir.

## Skeiðið er ætlað
teimum, sum skulu brúka Teams.

## Forkunnleiki
Tað er neyðugt at hava grundleggjandi telduførleikar.

# Word

## Endamálið er
Uppá ½ dag kann tú læra eina røð av snildum funkum, sum gera arbeiðsdagin hjá tær lættari og stuttligari. Tí tað kann vera rættiliga ørkymlandi at vita, at tað finnast snildari mátar at gera arbeiði uppá.

Tú fert at kenna nógvar funkur, sum tú ikki visti vóru til. Eitt nú um tú arbeiðir við stórum skjølum, hvussu tú lætt innsetur eina forsíðu og eitt innihaldsyvirlit. Um tú skrivar fleiri reglubrot við yvirskrift, hvussu koma hesar inn í innihaldsyvirltið ? Hvussu kanst tú stovna autotekst og finna skjøl aftur, sum tú hevur gloymt at goyma ?

Og mangt mangt annað.

## Innihald
Tú lærir

- fáa fulla nyttu burturúr amboðslinjuni
- skipa rondina (båndet/ribbon) til tín tørv
- finna tíni skjøl aftur, sum tú gloymdi at goyma
- brúka skermklipp - snildi avloysarin hjá print screen
- brúka skabelónir
- brúka formatpensilin
- brúka standardtekstir
- senda teldupost til nógv fólk í senn við ymiskum boðum
- brúka samanhangin millum typografi'ir og innihaldsyvirlit
- seta eina forsíðu inn
- samanbera tvey skjøl. T.d. tá starvsfelagin hevur rættað eitt skriv, uttan at viðmerkja hvar, hvar hann ella hon hevur gjørt broytingar.

Les meira um skeiðið á heimasíðuni hjá Synergi.

## Skeiðið er ætlað

### Teams

| | |
|---|---|
| Nær | 17.04.2023, kl. 9.00 - 12.00 |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | 1.700 kr. |
| Seinasta freist | 12.04.2023, kl. 12.00 |
| Tekning | Á heimasíðuni hjá Synergi |

### Word

| | |
|---|---|
| Nær | Eftir avtalu |
| Hvar | á Gjaldstovuni, 1. hædd í Albert Hall |
| Kostnaður | Eftir avtalu |
| Seinasta freist | Eingin |
| Tekning | skeid@gjaldstovan.fo |

WWW.
GJALDSTOVAN.
FO

KVÍGGJARTÚN 1, ARGIR
POSTBOKS 2009
110 TÓRSHAVN
FØROYAR

TEL +298 352 400
FAX +298 352 401

GJALDSTOVAN@GJALDSTOVAN.FO
GJALDSTOVAN.FO

GJALDSTOVAN